


# Popplist, Frændur og jól

**Tríggjar nýggjar jólafløgur eru komnar út í ár, men tær skulu kappast við fløgur sum Popplist 2, Frændur og M'as Blues Band, nú jólasølan av álvara kemur í hæddina**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Desember mánaði er ein gyltur mánaði, tá tað ræður um fløgusølu. Sølan av fløgum er góð alt árið, men seinasti mánaðin fyri jól er nakað heilt fyri seg.

Og tað eru nógvar útgávur, sum vilja verða við í gyltu søluni.

– Vanliga eru tað einar fimm fløgur, sum selja rættiliga væl áðrenn jól, meðan tað eru aðrar, sum mugu lúta í hørðu kappingini, sigur Høgni Zachariasen, sum er leiðari fyri fløgudeildina hjá 3'aranum.

Og fløgurnar, sum verða millum bestseljararnar í ár, verða uttan iva Popplist 2, nýtt fløgusett frá Frændum og jólafløgan Ein stjørna lýsti á nátt.

## Tríggjar jólafløgur

Á hvørjum ári kemur onkur nýggj jólafløgu út, og soleiðis er eisini í ár. Hesaferð er talan um tríggjar jólafløgur.

Kristiliga kórið United Voices hevur givið eina jólafløgu út, og á útgávuni Ein stjørna lýsti á nátt syngja ymsir føroyskir sangarar jólasangir. Millum sangararnar eru Guðrun Sólja Jacobsen og Linda Holmberg.

Útvarpið hevur givið jólakalendaran frá seinasta árið út á fløgu. Hetta var ein umfatandi og original framleiðsla við nýggjum tónleiki og eini góðari søgu. Tilfarið var so gott, at Útvarpið helt, at hon kundi gevast út á fløgu eisini.

Undan jólum fáa gamlar jólafløgur nýtt lív, og millum jólafløgurnar, sum selja nógv eintøk á hvørjum ári, eru Eg eri so spent til jóla, Jólafløgan og Alex Bærendsen.

## Frændur við øllum sínum

Nú um dagarnar kom eitt nýtt fløgusett út, og tað er frá kanska kendasta og best umtókta føroyska bólkinum í nýggjári tíð – Frændum.

Frændur komu við sínari fyrstu útgávu í 1984, og higartil hevur fyrsta útgávan bara funnist sum band ella lp-pláta. Men í nýggja fløgusettinum frá Frændum eru allar uppruna útgávurnar hjá bólkinum savnaðar. Hetta verður uttan iva ein av útgávunum, sum fara at selja væl áðrenn jól.

Ein onnur væl umtókt savnsfløga hevur longu verið á marknaðinum í fleiri vikur. Tað er Popplist 2, sum aftur í ár telist millum allarbest seljandi føroysku fløgurnar. á Popplist 2 er blandað tilfar frá føroyskum bólkum – bæði nýtt og gott gamalt.

## Aðrar útgávur

Tað eru eisini aðrar útgávur, sum eru komnar á marknaðin seinastu vikurnar, og tær verða við í hørðu kappingini um jólasøluna.

– Tað eru komnar fleiri útgávur í ár, og talan er eisini um fleiri dygdarútgávur enn áður. Tí er kappingin hørð, heldur Høgni Zachariasen.

Gospelbólkurin I AM hevur givið nýggja fløgu út, Elin og Óli hava savnað nakrar av teirra góðu løtum í barnaútvarpinum í sjeytiárunum á fløgu, M'as Blues Band er komið við næstu fløguni, trummuspælarin í Clickhaze, Høgni Lisberg, roynir seg við soloútgávu og aðrar fløgur eru eisini komnar seinastu vikurnar.










